# CHE-kabinettið má falla

EDMUND JOENSEN
løgtings- og fólkatingsmaður



CHE-landsstýrið er óarbeiðsført, og nú er politiska mandatið hjá formanni Javnaðarfloksins uppbrúkt. Tað er greitt eftir nýggjastu politisku kreppuna í Føroyum. Jóannes Eidesgaard eigur at lata sonevnda "initiativið" frá sær nú, so eitt formansumfar kann byrja.

Ongin kann longur vera í iva um, at politiska mandatið hjá formanninum í Javnaðarflokkinum til at skipa og standa á odda fyri stjórn í Føroyum er uppbrúkt.

Orsøkin er púra uppløgd og sjónlig fyri øll: CHE-samgongan hevur ferð eftir ferð ført landið út í politiskar kreppur. CHE er soleiðis ein óarbeiðsfør politisk samanseting – sjálvt við tí nýggja stuðulsflokkinum, samgongan hevur fingið afturat sær.

Seinasta dømið um óarbeiðsførið hava vit øll pínliga verið vitni til um vikuskiftið.

Formenninir í samgonguflokkunum – Jóannes Eidesgaard og Høgni Hoydal – settu alt sítt politiska trúðvirði upp á spæl við at skíra málið um fiskidagar ein "kabinettspurning" og sjálvur "legitimiteturin" undir samgonguni. Tá málið fall, er tað brádliga ikki ein kabinettspurningur kortini, og legitimiteturin er ikki rørdur. Menninir halda, at CHE-kabinettið kann halda fram.

Álvaratos tit, hvar er virðingin fyri demokratisku spælireglunum? Virðingin fyri veljarunum?

Í øðrum londum høvdu politiskir leiðarar verið so mikið at sær komnir, at teir í slíkum útmstøðum og eftir slíkar útmeldingar høvdu lagt frá sær beint eftir atkvøgreiðsluna um fiskidagarnar. Alt annað hevði verið og er óseriøst.

Nú kann ongin taka Jóannes Eidesgaard, Høgna Hoydal og CHE-politikkin í fullum álvara.

Tær demokratisku spælireglurnar peika nú tann vegin, at politiska mandatið hjá Jóannesi Eidesgaard at hava landsins leiðslu og hitt sonevnda "initiativið" er brúkt upp.

Nú er tíðin komin hjá formanni Javnaðarfloksins at lata "initiativið" frá sær. Mín staðiliga áheitan á formann Javnaðarfloksins er at lata upp fyri einum formansumfari, so greiða kann fáast á, um møguligt er hjá onkrum øðrum floksformanni at skipa samgongu.

Demokratisku spælireglurnar mugu ikki tambast í tann mun, tær nú eru tambaðar. Markið er rokkið, og formaðurin í Javnaðarflokkinum má ásanna hetta nú.

# Ja, Høgni, hevur Tjóðveldið førleika sum stjórnarberandi flokkur?

EYÐUN MOHR VIDERØ



Nú hendi tað aftur tvær ferðir. Tjóðveldið er komið í samgongu og hevur kosið sær Tobba til landssýrismann. Hann hevur roynt tað fyrr, men náddi ikki á mál.

Men spurningurin er -hví?-

Maðurin er ikki nakar dummur "hundur". Hann er sjarmerandi, er áhugaverdur at lurta eftir, um tú skilir innihaldið frá, men bert lurtar eftir hansara frásøguhátti.

Men kann ein sovorðin brúkast sum politikari í fremstu sessum?

Áður fór hann úr sessinum, áðrenn hann varð koyrdur, tí hann ikki vildi halda vanligar reglur um kurteisi!

Nú roynir hann seg aftur. Hann ber tvær løddar bumbur niðan í løgtingið, hóast landið ikki er í krígsstøðu.

Onnur er at skerja veiðirættindini hjá okkara fiskiflota við 50 prosentum, og í høvuðsheitinum snýr tað seg um at tynna út í flotanum, fyrst og fremst fyri at beina fyri ósunnari spekulasión, síðan fyri at lækka trýstið á fiskastovnin. Fylgjurnar av hesum uppskoti kenna vit nú.

Næsta eru broytingar í jarðalógini við tí endamáli at forða bóndum í ósunnari spekulasión. Fylgjurnar av hesum uppskoti kenna vit bert lutvíst enn, men henda framferð við ógvusliga innihaldinum vísir bert, at maðurin ikki er egnaður til at hava ábyrgd av landsins lógum.

Sagt verður, at summum mást tú ikki geva ov langt tjóður, men eg hevði ikki torað at slept honum úr eygsjón, uttan at hann sum ein hvør annar glúpskur rottweilari hevði havt kjaftband!

Annars haldi eg, at nógv av politiska upplandinum er mannað av væl skúlaðum vasknum skúlabørnum, men tann, ið ongantíð hevur havt ábyrgd av at skaffa sær føði sjálvur, men bert hevur havt fyri neyðini at gapa, tá maturin kemur, hann veit og kennir ikki støðuna hjá teimum, ið skulu skaffa sær mat í munnin á sjónum, ella í bø og haga!

# CHED kabinet ella kabaret??

KAJ LEO JOHANNESEN
Floksformaður
Sambandsflokkurin



Eg vil, vegna Sambandsflokkin heita á løgmann um at geva øðrum floksleiðarum møguleikan at seta nýggjan róðursmann og at seta nýggja manning í landsins leiðslu.

Samgongan hevur mist sín legitimitet aftan á dagin í løgtinginum fríggjadagin. Tað er staðfest fleiri ferðir, eftir at bæði Høgna Hoydal og Jóanes Ejdesgaard spældu høgt spæl við at royna at hótta Føroya Løgting til at atkvøða við CHED uppá fiskivinnupolitikkin. Hetta slagið taptu teir og mugu tí endaliga staðfesta at legitimiteturin hjá samgonguni er burtur.

At farið út nú og sagt, at vit hava sagt ósatt fyri Føroya Løgtingi og Føroya fólki, um hvørt hetta var ein kabinetspurningur ella ikki, vildi ikki bert verið at skatt trúvirðið á okkara politisku skipan, men eisini verði pínligt fyri føroyskan politikk.

Føroya land hevur nú ligið í stjórnarloysi síðani valið tann 19. januar, og Føroya fólk spyr av røttum hvat bagir.

Vit hava enn ikki frá landsins stjórn fingið eina politiska fíggjarlóg, sum setir kós fyri Føroya Fólk, men liva við eini fíggjarlóg, har nakrar konti vórðu justeraðar við uml. 20 mió. kr. og restin eru framskrivingar.

Samgongan hevur mist meirilutan tá talan er um útbyggingar á tunnilsøkinum.

Samgongan hevur mist meirilutan tá talan er um fiskivinnupolitikk.

Samgongan hevur mist meirilutan tá talan er um landbúnaðarpolitikk.

Samgongan hevur eisini blakað eitt uppskot um landbúnaðarlóggávu fyri løgtingið í óðum verkum, sum kollveltir allan landbúnaðin, t.v.s tvey uppskot innan fyri eina viku, sum hevur sent bæði fiskivinnu og landbúnaðarvinnu í koma.

Harumframt var eisini staðfest hóskvøldið í Degi og Viku frá Torbjørn Jacobsen landstýrismanni í fiskivinnu- og tilfeingismálum, at um niðurskurður í fiskidøgum var minni enn 20%, so var hann ikki landstýrismaður meira.

Føroya fólk ynskir sær eitt kabinett og ikki eina kabarett.

Eg fari tí vegna Sambandsflokkin at heita á Jóannes Eidesgaard um at geva øðrum floksleiðarum møguleikan at seta nýggjan róðursmann og at seta nýggja manning umborð. Hetta er tað vit á politiskum máli kalla, at løgmaður heitir á løgtingsformannin um at skipa fyri einum formansumfari.

# Stakir uppihaldarar og politiskar raðfestingar

KRISTIANNA WINTHER POULSEN
forkvinna í Javnstøðunevndini



Av og á bera fjølmiðlarnir okkum søgur um, hvussu hørð korini eru hjá støkum uppihaldarum í Føroyum. Ikki er langt síðani, at vit í Útvarpi Føroya hoyrdu eina staka mammu greiða frá, hvussu torført tað var at fáa endarnar at røkka saman. Seinasta søgan er at lesa í Dimmu mikudagin 13. august, har ein støk mamma sigur sína søgu um, at hon nú ongan annan útveg hevur enn at flyta av landinum.

Í ólavsøkurøðu síni endurgav løgmaður Jóannes Eidesgaard so vakurt Graham Bell fyri at hava sagt, at tá ein hurð fer í lás, fer onnur upp á bak. Tíverri sær tað út til, at tann nýopnaða hurðin hjá okkara støku uppihaldarum er ein einvegis ferðaseðil til Danmarkar. Fyri alla familjuna. Hetta er syrgiligt. Fyri eitt samfelag, hvørs fólkavøkstur at kalla stendur í stað. Fyri tær mammur, sum ongan annan útveg hava enn at flyta. Allarsyrgiligast er tað fyri teirra børn, sum av neyð verða skrødd upp úr heimliga umhvørvinum.

Í røðu síni á ólavsøku hevði løgmaður sjálvandi eisini nøkur orð við á vegnum um kvinnurnar, ið búgva uttanlands, og sum skulu heimaftur. Kvinnutrotið í Føroyum hevur jú verið eitt heitt evni í almenna kjakinum seinastu tíðina, ikki minst í valstríðnum. Á ólavsøku hoyrdu vit sostatt løgmann siga, at tá ein ung kvinna situr uttanlands og umhugsar at flyta heim aftur, skal hon síggja land okkara sum ein miðdepil við góðum og vælvirkandi vælferðartænastum.

Spurningurin er so, hví hendan unga kvinnan skal tíma aftur til Føroya. Gamaní fær hon møguleika at koyra biltúr gjøgnum undirsjóvartunlar ella søkja arbeiði á sendistovum í Moskva og New York. Men tað verður nokk torført at sannføra hana um, at Føroyar eru eitt samfelag við góðum og vælvirkandi vælferðartænastum.

**Politiskar raðfestingar**
Eftir valið í 2004 fór miðfyrisitingin úr 9 aðalráðnum niður á 7. Millum annað varð Heilsumálaráðið lagt saman við Almannamálaráðnum. Um hetta var ein røtt avgerð, veit eg ikki. Men kanska hevði verið longri millum keðiligu søgurnar um heilsuverkið, um hetta fekk hægri politiska raðfesting.

Og eftir valið í 2008 heldur øll samgongan, at føroyska samfelagið skal brúka pengar til eitt Uttanríkisráð. Uttan at nakar hevur mælt eitt neiligt orð, hava vit 49.000 føroyingar nú brádliga 8 aðalráð, har vit tey seinastu fýra árini hava havt sjey.

Eisini hava vit eftir øllum at døma ráð til eina nýggja nevnd í løgtinginum, sum skal taka sær av stjórnarskipanini.

Meðan tað er ógjørligt at finna pening á fíggjarlógini til virðiligar vælferðartænastur, ið høvdu gjørt stóran mun í gerandisdegnum hjá nógvum av okkara støku uppihaldarum og øðrum borgarum, ið hava tørv á hesum.

**Hvat tørvar okkum?**
Nú tørvar okkum Tróndar skarpa vit, Sigmunds bjarta hjartalit og Sverris vilja sum stál. Við hesum orðum, leysliga endurgivin úr sanginum Hvørjum man tykja vakurt hjá sær eftir Fríðrik Petersen, endar løgmaður ólavsøkurøðuna 2008. Hesar reystu kappar munnu vit øll hava hoyrt um, síðani vit byrjaðu í 1. flokki í fólkaskúlanum. Um teirra persónligu eginleikar eru ynskiligir fyri okkum føroyingar, veldst um tulking av søgu og um eyguni, sum síggja. Tað er bert harmiligt, at løgmaður ikki hirðir at nevna eitt einasta konufólk í síni uppreksan av ynskiligum fyrimyndum hjá føroyska fólkinum. Hóast kvinnur síðani landnámið hava búð í Føroyum, eru teirra avrik og eginleikar at kalla ósjónlig í søguskriving, í tjóðarskaldskapi og eyðsýniliga eisini í høvdinum hjá løgmanni og hjá teimum, sum ráðgeva honum í at skriva røður. Kann hetta vera ein av mongum orsøkum til, at so nógvar kvinnur ikki trívast í hesum samfelagnum?

**Og hvussu við kvinnunum?**
Tað var hugaligt at síggja tingið og landsstýrið savnast á ólavssøku. Endiliga vóru eisini kvinnur at síggja millum politikararnar í skrúðgonguni úr dómkirkjuni í tingið.

Onkur hevur sagt, at tað ongantíð hava verið so nógvar kvinnur á tingi sum nú, og at tosið kortini ongantíð hevur snúð seg so nógv um tunlar sum nú. Er tað so nakað endamál at arbeiða fyri at fáa fleiri kvinnur upp í politikk?

Sum Beinta í Jákupsstovu, granskari, hevur víst á, hava kanningar víst, at størri munur er á raðfestingum millum kvinnur og menn, enn millum ymiskar politiskar flokkar – borgarligar og sosialistiskar. Kvinnur raðfesta mál sum skúla, barnagarð, mentan og heilsu- og almannamál hægri enn vinnumál, vegir og annað byggivirksemi, og menninir beint øvugt.

Eftir valið í januar í ár komu 8 kvinnur á ting. So í 2008 er kynsbýtið í tinginum sløk 25 prosent av konufólki, og góð 75 prosent av mannfólki. Spurningurin er, um hetta kynsbýtið er nøktandi, um fólk ynskja broytingar á politisku dagsskránni, so at Føroyar veruliga skulu mennast til tað nútímans vælferðarsamfelagið, sum øll siga seg vilja hava.

Við einum javnari kynsbýti fáa tær støku mammurnar, sum eru illa fyri í dagsins samfelag, og allir aðrir borgarar, sum uppliva ein fíggjarliga strævnan gerandisdag, við tíðini vónandi eina sterkari rødd í politisku raðfestingunum og í stríðnum um, hvussu fíggjarlógin skal brúkast. Sum tunlar, uttanríkismál og heit luft hava tað í dag.